

*Nú skal verða einfaldari at fáa koyrilíkindi og beint har ið bilførarin er staddur í landinum*

# Nýggj koyrilíkindi umvegis sms

**Tænasta:** Landsverk fer nú at bjóða eina nýggja tænastu, har fólk fáa møguleika at fáa tey nýggjastu koyrilíkindini umvegis sms-skipanina.

Hesin nýggi upplýsingarmiðilin fer í fyrstu syftu at veita teimum koyrandi fimm ymiskar tænastur.

Hesar fimm tænasturnar umfata koyrilíkindi, kunngerðir og ávaringar. Møguleiki er eisini at fáa nærri upplýsingar um veðurmátingar og aldumátingar.

Serliga fyri tey koyrandi er her talan um eina henta tænastu. Hon er víðkað soleiðis, at tann koyrandi nú kann spyrja um koyrilíkindir fyri ávísar vegateinar, ávís økir ella rutur í landinum.

Á henda hátt fáa hesi enn neyvari og meira viðkomandi upplýsingar um koyrilíkindini beinleiðis inn í fartelefonina ella við at spyrja á heimasíðuni.

– Óhugsandi er ikki, at stovnurin fer at koma við fleiri tænastum seinni, verður sagt.

**sb.**

# Vágatunnilin skal gjaldast skjótari




*Vágatunnilin skal gjaldast skjótari niður, soleiðis at tað verður skjótari ókeypis koyring gjøgnum hann*

**Sandavágur:** Á bygdarráðsfundi í farnu viku samtykti bygdarráðið at skunda undir, at Vágatunnilin verður skjótari niðurgoldin.

Bygdarráðið í Sandavágs kommunu samtykti nevniliga at senda eina áheitan til Vinnumálaráðið og løgtingsmenninar í Vágum. Her verður heitt á hesi um at virka soleiðis fyri, at raksturin av Vágatunlinum verður lagdur undir Landsverk, soleiðis at P/F Vágatunnilin bert skal figgja sjálva íløguna.

– Verður tað gjørt, kann tunnilin gjaldast niður skjótari, og sostatt verður eisini skjótari, til frítt er at koyra gjøgnum tunnilin, verður sagt.

Á evnisdegi um Vágatunnilin, sum Vága Kunningarstova skipaði fyri í farna mánaði, varð hetta hugskotið lagt fram.

Nú hevur Sandavágs Kommuna tikið tað upp alment og samtykt at senda fyrstu áheitanina til myndugleikarnar um hetta.

**sb.**

